# Veðrið

**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag, leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul av norði og landnyrðingi, sum spakuliga minkar. Turt og serliga yvir útsynningspartinum møguliga nakað av sól. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av norði. Turt og nakað av sól, men sum frálíður meira skýggjað. Hitin millum 7 og 10 stig.

# Edward á árligu summarframsýningini

*Mikudagin lat árliga summarframsýningin upp í Norðurlandahúsinum. Í ár er Edward Fuglø framsýnandi summargesturin*

DAGFINN OLSEN

Vanligt er, at Norðurlandahúsið hevur eitt listafólk sum summargest.

Hósdagin lat árilga summarframsýningin upp í Norðurlandahúsinum og í ár er tað listamaðurin Edward Fuglø úr Klaksvík, ið sleppur at fylla karmarnar út.

Norðurlandahúsið er stórt og Klingran krevur sítt. Tí er tað ein góður møguleiki hjá listafólki at sýna fram har. Men samstundis er tað eisini ein sera stór avbjóðing, tí hølið er kravmikið. T.d. krevja stóru veggirnir stórar myndir.

Edward Fuglø hevur á framsýningini 22 myndir við. Sum so ofta, eru myndevnini dreymakend og æv-intýrkend. Men sum heild eru myndirnar eisini sera ymiskar. Myndirnar hava heiti sum t.d. Sleeping Beauty, Í bønum, Kykt, Dreymur, Ravnur Undir Kambi, Ævintýrfuglur, Hvíti Ormur, Catching the Fish og Á ferð.

Og samanumtikið má sigast, at Edward Fuglø er ein av listamonnum okkara, ið er á ferð, ið roynir ókendar leiðir og ger royndir. Samstundis er hann millum teir mest fjølltáttaðu listamenninar, ið bæði myndprýðir bøkur, leiktjøld og sum kann hava stórfingnar stak-sýningar.

Edward sigur, at hann alla tíðina trilvar seg fram og roynir okkurt nýtt.

Í myndarøðini Sleeping Beauty sæst tann sovandi og dreymurin.

Sera spennandi er myndarøðin Í bønum. Myndirnar eru stórar, vakrar og her bjóðar Edward eisini eygleiðaranum av.

Tá sýningin lat upp klokkan 16 mikudagin, setti Helga Hjörvar, stjóri í Norðurlandahúsinum Summarframsýningina 2000. Eisini sang Kári Sverrisson og rúnarbant fjøldina, ið var komin saman hesa løtuna.

Summarframsýningin 2000 er opin frá 28. juni til 6. august 2000.



*Hósdagin lat Summarframsýningin 2000 upp í Norðurlandahúsinum. Í ár er tað Edward Fuglø, ið eigur spennandi og avbjóðandi uppgávuna at fylla út karmarar í Klingruni*



*Kári Sverrisson sang og leikti, tá Summarframsýningin 2000 lat upp hósdagin, og hann rúnarbant fjøldina*




Eitt hátrýst, 1025 hPa, frá landnyrðingspartinum av Grønlandi til Føroyar liggur næstan í stað og viknar spakuliga.




Eitt lágtrýst yvir Ruslandi fer vestur eftir móti Danmark og lýggj luft rekur inn yvir Føroyar eystaneftir.




**Hitalagið mált frá 28./06. kl 06⁰⁰–29./06. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,7°C**
Minsti hiti máldur í juni: **0,0°** Mesti hiti máldur í juni: **20,0°**




Avfallið: 0,0 mm – **mált frá 28./06. kl 6⁰⁰–29./06. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í juni: 46,9 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 11 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 19 |
| Tromsø | 16 |
| Bergen | 10 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 18 |
| Keypmannahavn | 12 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 14 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 13 |
| Kiev | 16 |
| Bukarest | 23 |
| Paris | 21 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 25 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 28 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 36 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | – |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 13 |
| New York | 26 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 13 |

## Vestfalskyrrindi

25. juni: Seinna kvarter
1. juli: Tendring/Mánin næstur jørðini

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 30. juni | 6.11 | 18.38 | 5.11 | 17.38 | 5.26 | 17.53 | 8.11 | 20.38 | 9.11 | 21.38 | 4.26 | 16.53 | 3.26 | 15.53 | 6.26 | 18.53 | 7.26 | 19.53 | 5.56 | 18.23 | 7.11 | 19.38 |
| 1. juli | 7.01 | 19.24 | 6.01 | 18.24 | 6.16 | 18.39 | 9.01 | 21.24 | 10.01 | 22.24 | 5.16 | 17.39 | 4.16 | 16.39 | 7.16 | 19.39 | 8.16 | 20.39 | 6.46 | 19.09 | 8.01 | 20.24 |
| 2. juli | 7.44 | 20.05 | 6.44 | 19.05 | 6.59 | 19.20 | 9.44 | 22.05 | 10.44 | 23.05 | 5.59 | 18.20 | 4.59 | 17.20 | 7.59 | 20.20 | 8.59 | 21.20 | 7.29 | 19.50 | 8.44 | 21.05 |
| 3. juli | 8.27 | 20.47 | 7.27 | 19.47 | 7.42 | 20.02 | 10.27 | 22.47 | 11.27 | 23.47 | 6.42 | 19.02 | 5.42 | 18.02 | 8.42 | 21.02 | 9.42 | 22.02 | 8.12 | 20.32 | 9.27 | 21.47 |

Kelda: Skipalistin 2000


sosialurin
www.sosialurin.fo

TURRIKLÆÐI, HÚGVUR, T-SHIRT, KEPPAR og FLØGG



12. MAÐUR
http://soccer.at/faroes